# Skjal 2:

# Frágreiðing um virki ráðsins 2008

## Inngangur

Við hesum letur útnorðurnevndin Løgtinginum árligu frágreiðingina um virki sítt í farna ári.

Útnorðurráðið er samstarvsfelagsskapur ímillum Løgtingið, Landstingið og Altingið. Stevna ráðsins er:

a. at samstarva um áhugamálini hjá londunum í útnorðri.
b. Saman at varða av tilfeingi og mentan í londunum í útnorðri, hjálpa til at menna áhugamál í útnorðri um stjórnir og landsstýri ikki minst, tá ið álvarsom mál stinga seg upp um, hvussu tilfeingið skal skipast, dálkan o.a.
c. Fremja samstarv hjá stjórnum og landsstýrum í útnorðri.
d. At arbeiða saman við Norðurlandaráðnum og vera millumliður í áhugamálum hjá londunum í útnorðri í norðurlendskum samstarvi.

Fyri virksemið hjá Útnorðurráðnum er galdandi Sáttmálaskjal um Útnorðurráðið, samtykt á Løgtingi 26. mai 1997. Ráðið virkar sambært serligari starvsskipan. Útnorðurráðið hevur skrivstovu í Reykjavík og sína egnu heimasíðu.

Løgtingið velur 6 limir í ráðið, Altingið 6 og Landstingið 6. Løgtingið valdi 13. februar 2008 hesar limir í føroysku sendinevndina til Útnorðurráðið:

Andrias Petersen
Bergtóru Høgnadóttir Joensen
Poul Michelsen
Magna Laksáfoss
Kára P. Højgaard
Jenis av Rana

Sendinevndin hevur skipað seg við Kára P. Højgaard sum formanni og Andrias Petersen sum næstformanni.

Formansskapur Útnorðurráðsins, ið varð valdur á ársfundinum í Grundarfirði 25. – 26. august 2008 er mannaður soleiðis:

Formaður: Kári P. Højgaard
1. næstformaður: Ruth Heilmann
2. næstformaður: Karl V. Mattiasson

# Fundir í árinum

## *Formansskapurin*

Formansskapurin hevur til samans hildið 5 fundir í 2008.

Í apríl mánaði hevði formansskapurin fund í Reykjavík við eina sendinevnd frá Europatinginum, sum tekur sær av parlamentariska samstarvinum við Ísland, Noreg, Schweiz og Útnorðurráðið, við Bilyana Raeva, limur í Europaparlamentinum úr Bulgaria, sum formanni.

Í sambandi við ársfundin hjá Norðurlandaráðnum í Helsingfors 27. – 29. oktober 2008, hevði formansskapurin fundir við landsstýrismenn og ráðharrar í londunum í útnorðri. Fundir vóru við landsstýrismenn og ráðharrarnar í fiskivinnumálum, uttanlandsmálum, menta- og undirvísingarmálum og norðurlendskum samstarvi. Formansskapurin hevði eisini fund við formansskap Norðurlandaráðsins. Eisini var formansskapurin við á einum fundi um "Eus Nordlige Dimension".

## *Evnisfundur 5. – 7. juni 2008 í Tórshavn*

Evnisfundurin í 2008 varð hildin í Tórshavn 5. til 7. juni. Evnið á fundinum var "Broytt viðurskifti í tilbúgvingar- og bjargingarsamstarvinum í Norðuratlantshavi". Endamálið var at lýsa, hvørjar samstarvsavtalur eru um bjarging millum londini í útnorði, og hvørjar framtíðarætlanir eru um bjarging og tilbúgving í útnorði.

Fyrilestrarhaldarar vóru úr Føroyum, Íslandi, Grønlandi og Danmark. Umframt limirnir í útnorðurráðnum luttóku eisini á fundinum landsstýrismenninir Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, umboð fyri íslendska og norska løgmáleráðið, umboð fyri Norðurlandaráðið, danska Fólkatingið, og svenska Ríkistingið. Tilsamans vóru uml. 70 luttakarar á evnisfundinum. Evnisfundurin endaði við stórari bjargingarroynd í Nólsoyarfirði, har sjálvbodnu bjargingarfeløgini úr Føroyum og Íslandi luttóku saman við MRCC Tórshavn, Vaktar- og Bjargingartænastuni, Færøernes Kommando og Íslendsku vaktartænastuni.

## *Ársfundur 25. - 28. august 2008 í Grundarfirði*

Á fundinum varð nýggjur formansskapur valdur. Valdir vórðu:

| | |
|---|---|
| Formaður: | Kári P. Højgaard |
| 1. næstformaður: | Ruth Heilmann |
| 2. næstformaður: | Karl V. Mattiasson |

4 tilráðingar vórðu samtyktar, umframt ein frágreiðing til samtyktirnar nr. 7 og 8/2007. Gestarøðarar á ársfundinum vóru m.a. Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkismálum, sum greiddi frá royndunum av Hoyvíkssáttmálanum, umboð fyri formansskapin í Norðurlandaráðnum, Kent Olsson, næstformaðurin í norska Odelstinginum, Olav Gunnar Ballo og Lars Thostrup, stjóri í NORA.

Eisini var evnisfundur um verkætlanina um felags søguskriving um útnorður. Fyri ritstjórnina luttóku Daniel Thorleifsen, Jón Þ. Þór, Andras Mortensen, Kristia Paarnannguaq, Erland Viberg Joensen, Elin Susanna Jacobsen, Guðni Th.

Jóhannesson og Sigríður Jörundsdóttir, og greiddi tey frá arbeiðinum. Ætlanin er at skriva eina bók, sum skal verða greið at fara til prentingar á heysti 2009.

## *Barnabókavirðisløn*

Barna- og ungdómsbókavirðisløn Útnorðurráðsins 2008 varð latin íslendsku bókini bókini “Draugaslóð” (Spøkilsisslóðir), sum Kristín Helga Gunnarsdóttir hevur skrivað og teknað. Virðisløn er 60.000 DKK.